# rna

hann sigur eisini, at tað er júst har, hann kann hjálpa.

– Eg havi amboðini, og eg kann lata hurðarnar upp – men tað er kortini upp til matstovurnar sjálvar, um tær megna og vilja ganga tann vegin sum ger, at tær gerast vælumtóktar »kvalitets-matstovur«, sigur Bo Bech.

Eg royni at fritta eitt sindur, um tað hevur ávirkað hann nakað, at hann nú er líka kendur sum SV-stjørna, sum kokkur, og um tað annars hevur ávirkað hansara lív.

– Eg síggi ikki meg sjálvan sum nakra sjónvarpsstjørnu. Mín uppgáva í hesum sambandi er, at royna at hjálpa matstovum, sum á einhvønn hátt eru komnar illa fyri, á rætta leið, og tað er alt, eg havi áhuga í, sigur Bo Bech.

## Slutt við vánaligum mati

Bo Bech dylir tó ikki fyri, at hann er ógvuliga errin av, at øll eftir øllum at døma, hava peikað á hann í sambandi við hesa sendingina. Men hann kennir ikki seg sjálvan nakað ørvísi av teirri orsøk. Tað einasta, hann er áhugaður í, er, at tað er góður matur, sum verður borðreiddur fyri kundunum runt um landið (sum altso eisini umfatar Føroyar), og at hann kann gera ein mun í so máta.

– Fyrr var tað mesta av matinum her á Rio Bravo sett saman av pulvuri. Nú byggja tey matin upp frá grundini við fyrsta floks tilfari. Tað er tann stóri og avgerandi munurin. Nú kann Rio Bravo bjóða mat av allar bestu góðsku til ófatiliga kappingarførar prísir. Og tað er í grundini tað, ið hevur mín áhuga í sambandi við hesa sendingina, sigur meistarakokkurin Bo Bech.

Bo Bech er ikki bara ógvuliga fyrikomandi. Tú fært eisini beinanvegin ta kláru kenslu av, at hann veruliga gongur høgt upp í sítt professionella yrki sum kokkur.

– Tað skal verða slutt við vánaligum mati. Tað skal verða slutt við at snýta fólk. Og her á Rio Bravo hevur tað kravt stórt mót at venda gongdini. Men tað hevur personalið eftir mínum tykki megnað at gjørt eftir hesi stuttu tíð, sigur Bo Bech at enda í samrøðu við Sosialin.

Og um onkur vil vita meiri um Bo Bech, ber til at fara inn á heimasíðu hansara, sum eitur: www.bobech.net

Mikkel Dyrting, framleiðslustjóri á TV3:

# Føroyar avgerandi tá vit valdu stað

**– Sjálvandi taldi tað ógvuliga nógv, at tað var Føroyar, talan var um, tá vit skuldu velja millum matstøðini. Hetta var fyri okkum ein ótrúligur møguleiki at koma upp her, og tí eru vit á Rio Bravo í kvøld, segði Mikkel Dyrting**

SV-FRAMLEIÐSLA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Hann smílist um alt andlitið og tú kennir, at hetta er nakað, honum líkar.

Hann eitur Mikkel Dyrting, og er framleiðslustjóri á sendingin »Med kniven for struben« hjá donsku sjónvarpsstøðini TV3.

– Øll møgulig fakøki finnast innan sjónvarp, og tí eri eg kanska eitt serligt dømi. Eg havi eina masterútbúgving í dokumentarfilmslist frá University of Humberside í Hull, haðani eg tók prógv fyri einum 10 árum síðani, sigur Mikkel Dyrting, tá vit fanga hann eina róliga løtu í upptøkunum.

Vit spyrja hann sjálvandi um, hvussu tað ber til, at vit yvirhøvur kunnu hitta hann á Rio Bravo hetta kvøldið.

– Vit fingu eina áheitan frá einari føroyskari matstovu um at verða við í sendingini, og tað hildu vit vera so mikið spennandi, at vit gjørdu av at fara til Føroyar at gera forkanningar. Og meðan vit vóru her, komu aðrar áheitanir so vit endaðu uppi á fýra, greiðir framleiðslustjórin, sum eisini virkar sum leikstjóri, frá.

Rio Bravo var ikki tað matstaðið, sum sendi upprunaligu áheitanina, men tá forkanningarnar vóru liðnar, vóru tvey matstøð framvegis áhugað, og annað teirra var matstovan hjá Kára Hentze og partnarum.

– Vit gjørdu so av at velja Rio Bravo, tí vit mettu, at her funnust størstu møguleikarnir fyri at gera ein veruligan mun, sigur Mikkel Dyrting.

## Dokumentar

Tað skulu nógvar fyrireikingar til fyri at gera eina slíka sending. Fyri tað fyrsta verður ikki alt tikið upp ta tíð, filmsliðið er á staðnum. Og ikki minni týdning hevur, at ikki alt verður víst, sum tikið verður upp. Allar upptøkurnar, sum vara í tímar, kanska enntá dagar, skulu klippast til at vara umleið trý korter. So varar sendingin ein tíma og tey hava hetta korterið (ella meiri) til lýsingar, sum er grundarlagið undir flestu sjónvarpsstøðum í verðini í dag.

– Eg vil ikki kalla hetta fyri reality-sjónvarp. Her er tað eingin, sum vinnur eina miljón krónur. Tí nevni eg tað fyri dokumentar-sjónvarp. Tí í hesum førinum vinna matstøðini hóast alt nýggj viðskiftafólk, eins og tey gomlu kunnu koma aftur. Og tað hevur ikki so lítlan týdning fyri tey luttakandi matstøðini, sigur Mikkel Dyrting.

Framleiðslustjórin sigur, at vit her eru í einari veruligari verð, har fólk seta teirra egnu pengar til og í veð. Her kanst tú ikki bara »dryssa« inn av gøtuni og sjarmera teg til nakrar atkvøður millum hyggjararnar, og bara við góðum sjónleikaraevnum, tá upptøkutólini eru frá, vinna tær hópin av peningi.

– Nei, hetta er veruligt dokumentar, vísir framleiðslustjórin á.

## Føroyar vóru avgerandi

Mikkel Dyrting sigur, at tey fáa óteljandi áheitanir frá øllum pørtum av landinum, og tí er ovmikið at velja ímillum. Sjálvandi eru ikki allar matstovur egnaðar til júst hesa sendingina, men framvegis er ivaleysa nógv hjá teimum at fara til. Men tá ein áheitan kom úr Føroyum, fekk hon serliga viðgerð.

– Tað er einki at taka seg aftur í, at tá áheitanin úr Føroyum varð viðgjørd, var beinanvegin gjørt av at koma higar til forkanningar. Føroyar eru jú fyri okkum eitt eksotiskt og spennandi stað. Valið fall so í síðsta enda á Rio Bravo, sigur Mikkel.

Tá alt so er greitt, kemur filmsliðið á staðið.

– Vit nýta vanliga 5 dagar til upptøkurnar. Fyrsta dagin gongur Bo Bech fyri tað mesta runt og setur seg inn í tingini, og síðani byrja veruliguupptøkurnar, greiðir Mikkel frá.

Sendingin hevur fingið íblástur frá ensku sendingini »Gordon Ramsey's Kitchen Nightmare«. Hesin sami Ramsey er eisini kendur frá sendingini »Hells Kitchen«

Tað sigur seg næstan sjálvt, at tað er ikki nóg mikið at vera ein góður kokkur, fyri at gerast vertur í slíkari sending. Neyðugt er eisini við sjónvarpstekki og útstráling. Og í grundini var ikki so trupult at finna rætta mannin.

– Tá vit skuldu gera hesa »casting'ina« høvdu vit í veruleikanum bara einar 5 kokkar at velja ímillum, ið vóru nóg dugnaligir til sítt fak. Bo var so tann, sum egnaði seg best til sendingina, og soleiðis bleiv tað, sigur Mikkel Dyrting.

Vanliga er tað so, at tá hesar 5-daga upptøkurnar eru lidnar, kemur filmsliðið aftur nakað seinni, ofta 3-4 vikur seinni, at vita, hvussu hevur gingist. Í hesum førinum er ætlanin at koma aftur longu um 14 dagar. Í filmsliðinum eru 6 fólk íroknað Bo Bech.

Og fyri tey, sum bíða spent eftir sendingini um Rio Bravo kunnu vit avdúka, at hon verður send týskvøldið 1. mai á TV3.




*Mikkel Dyrting er óvanilgur innan filmsverðina. Hann hevur eina masterútbúgving í dokumentarfilmslist frá University of Humberside í Hull, haðani hann tók prógv fyri einum 10 árum síðani.*

*Mynd: Aksel Joensen*



*Her tosa upptøku- og ljóðmaðurin við Bo Bech, meðan støðgur er í upptøkunum.*

*Mynd: Aksel Joensen*